

www.oljan.fo

**Jan Müller** 24 - 12 - 2012

# Nú kann Oljugrunnurin keypa Empire State Building

Norski oljugrunnurin hevur nú fingið loyvi til at keypa tey kendu háhúsini Empire State Building í New York. Um tey verða lýst til sølu. Hetta er greitt, nú norska fíggjarmálaráðið hevur gjørt av at geva oljugrunmninum heimild til at keypa fasta ogn uttan fyri Evropa. -Grunnurin ger íløgur í partabrøv og virðisbrøv um allan heimin, og nú fær hann eisini heimild til at gera íløgur í fasta ogn allastaðni í heiminum. Tað verður til gagns fyri grunnin, at vit spjaða íløgurnar, sigur fíggjarmálaráðharrin, Sigbjørn Johnsen. Í heimildini frá fíggjarmálaráðnum stendur, at grunnurin kann í mesta lagi seta fimm prosent av sínum pengum í fasta ogn, og at tað skal gerast yvir eitt longri tíðarskeið. Fimm prosent av pengunum hjá Oljugrunninum svarar til einar 190 milliardir krónur. Tey bæði seinastu árini hevur grunnurin sett 36 milliardir krónur í fasta ogn. Higartil hevur Oljugrunnurin bara havt heimild til at seta pengar í fasta ogn í Evropa, men eftir ráðum frá Norges Bank gjørdi stjórnin av at víðka heimildina. Broytingin kemur í gildi nú á nýggjárinum. Stjórin fyri íløgudeildina hjá grunninum sigur við BBC Wold News í morgun, at teir taka eitt stig í senn. Byrja við USA men fara seinni eisini at venda eyguni móti marknaðinum í Asia.